# Elin er ráðgevi hjá 430 túsund dønum

Út ímóti eini hálvari millión lesa við, tá Elin skrivar greinar í blaðnum, ið hon sjálv hevur skapt. Konseptið aftan fyri blaðið er einfalt: eitt ynski um at gera gerandisdagin lættari hjá lesaranum.




*Søgan um KIWI byrjar í 2003, tá Elin sá lýsing eftir blaðstjóra til eitt ókeypis tíðarrit, sum stóra útgávufelagið Chili Group gav út. Blaðið skuldi liggja frammi í teimum 368 handlunum í NETTO ketuni. Handlarnir hava umleið tvær milliónir viðskiftafólk um vikuna, og blaðið skuldi venda sær til so nógv av hesum sum møguligt*

*Orð: Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun J. Hansen*

Elin Heinesen er blaðstjóri á danski tíðarritinum KIWI, ið kemur út eina ferð um mánan og hevur 430.000 lesarar. Blaðið er ein av teimum heilt stóru sólskinsøgunum í danska blaðheiminum, og Elin eigur høvuðsábyrgdina fyri stóru undirtøkuna. Hon hevur ment konseptið, valt málbólk og sitið sum blaðstjóri frá fyrsta degi.

Elin er 47 ára gomul, eigur eina 15 ára gamla dóttir við fyrrverandi manninum, Elin býr saman við sjeikinum í eini íbúð mitt í Keypmannahavn, annað hvørt vikuskifti eru børnini hjá honum hjá teimum. Hann eigur ein drong, sum er 15 og eina dóttur, sum er 8. Dóttur Elina býr somuleiðis hjá teimum, men er í løtuni á eftirskúla í Langeland.

Eg havi hitt Elina í íbúðini, ið liggur eitt hanagleiv frá Amalienborg, og meðan glóðheita kaffi úr nýggju senseo maskinini, kitlar lukti- og smakksansirnar, spyrji eg hana um, hvussu ein føroysk kvinna gerst blaðstjóri á einum so stórum blaði?

## Tíðarrit í NETTO

Søgan um KIWI byrjar í 2003, tá Elin sá lýsing eftir blaðstjóra til eitt ókeypis tíðarrit, sum stóra útgávufelagið Chili Group gav út. Blaðið skuldi liggja frammi í teimum 368 handlunum í NETTO ketuni. Handlarnir hava umleið tvær milliónir viðskiftafólk um vikuna, og blaðið skuldi venda sær til so nógv av hesum sum møguligt. Elin greiðir frá "At hetta, at samstarva við t.d. eina handilsketu og geva hesi ketu einkarrætt til útbreiðslu av einum blaði, er eitt rættuliga nýtt konsept í Danmark, men verður eisini brúkt í Bretlandi.

## Ein av 400

Elin var tá júst liðug í tíðaravmarkaðum starvi hjá Føroya Tele, har hon kannaði møguleikarnar fyri at seta á stovn Rás 1. Hon og 400 onnur søktu starvið. Men Elin varð tann, ið fekk tað. Tey fóru beinanvegin undir at kanna, hvørji fólk keypa í NETTO, og hóast talan er um nógv ymisk fólk, so var ein yvirvág í kvinnum. Við støði í kanningunum, var konseptið aftan fyri KIWI skapt: Eitt blað sum vendir sær til nútímans kvinnuna. Undir herrópinum "Råd til mere" verður dentur lagdur á, at gera lívið hjá lesaranum eitt sindur lættari. "Her er í botn og grund talan um góð ráð um, hvussu lesarin kann spara pening, gera ymiskt sjálvur og fáa betri tíð í gerandisdegnum." sigur Elin.

Blaðið er í stóran mun óheft av NETTO, umframt eina síðu í blaðnum, sum NETTO hevur til lýsingar og eina avtalu um, at aðrar matvøru handilsketur ikki lýsa í blaðnum, er blaðið óheft.

## Fíggja av lýsingum

KIWI verður fíggjað av lýsingum, og umleið helvtin av blaðnum er lýsingar. Hin helvtin er tilfar, sum Elin skrivar sjálv, sum freelancarar skriva og tilfar, sum verður latið av feløgum og einstaklingum, ið skriva ókeypis til blaðið. "Seks om dagen, ið er ein herferð fyri at fáa danir at eta grønmeti og frukt, hevur tildømis eina síðu í blaðnum. Kunningardeildin aftan fyri herferðina skrivar greinarnar beinleiðis til KIWI, men eg havi sjálvandi